## Fiskikapping á Eiðisvatni

Fríggjadagin 10. juli verður fiskikapping á Eiðisvatni, har skipað hevur verið fyri fiskikapping seinastu árini. Tiltakið endar leygardagin 11. juni klokkan 12, tá fiskarnir verða vigaðir og vinnarin funnin. Størsti, næststørsti og triðstørsti fiskurin geva steyp. Fríggjakvøldið verður røða við Magna Laksáfoss, og felagssangur verður somuleiðis á skránni. Seinastu tvey árini hava eini 200 fólk verið við til fiskikappingina á Eiðisvatni, sum stuðulsfelagið hjá EB/Streymi skipar fyri. Sum nakað nýtt verður morgunmatur seldur leygarmorgunin.




## 137 umsóknir til 48 pláss

Tilsamans 137 vilja verða antin lærari ella pedagogur. Tað er greitt, nú umsóknarfreistin til Føroya Læraraskúla er farin. Tá ið freistin at søkja var úti vóru 67 úmsóknir til læraraútbúgvingina og 70 til pedagog. Og 24 sleppa inn á hvørja útbúgving. Umsøkjararnir fáa svar í fyrstu viku í juli. Fleiri umsóknir eru í ár enn í fjør. Tá freistin at søkja í fjør var úti, vóru 109 umsóknir. Tá varð gjørt av at leingja freistina til á Ólavsøku, og nakrar umsóknir komu afturat. Í fjør vórðu 48 tikin inn á hvørja av teimum báðum útbúgvingunum, og tey vórðu liðug við 1. árs lestur eftir royndarskipan í síðstu viku.
Kelda: www.kringvarp.fo

Alternativt uppskot:

# Uppboðssøla, kassar og

**- Tað rætta hevði verið, um vinnan sjálv fekk eina skipan upp at standa, har uppboðssøla, kassamiðstøð og nakrar fáar landingarmiðstøðir komu undir ein hatt. Grundkapitalurin skuldi verið eitt "klikk-gjald", sum øll vinnan var við til at gjalda. Hetta hevði verið skilabetri enn eitt tilfeingisgjald. Afturfyri kundi vinnan tá umsitið sosialu skipaninar í vinnuni fyri tað almenna. Tá høvdu vit fingið móttøkur, sum syrgdu fyri, at góðska og hagreiðing og harvið eisini prísøking altíð var optimal, sigur vinnulívsmaður, sum Sosialurin hevur tosað við**



*Nakað av virksemi var við bryggjukantin á Toftum í morgun, tá Sosialurin hugdi fram við. Onkur línubátur og onkur trolbátur landaðu*
Mynd: Vilmund Jacobsen

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Røringur er komin í um landing og sølu av fiski um ávikavist Landingarmiðstøð Føroya, sum tekur sær av landing og avgreiðslu og Fiskamarknaðin Føroya, sum tekur sær av sjálvari søluni.

Hetta er hent eftir, at útróðrarmaður herfyri segði, at landingar-og søluútreiðslur eru ov høgar í mun til tað, sum fæst fyri fiskin, nú fiskaprísirnir í longri tíð ikki hava verið serliga góðir.

Útróðrarmaðurin fýltist eisini á, at útróðrarbátar noyðast at rinda ymisk gjøld, eitt nú barsilsgjald, til almennu skipaninar.

### Ikki rætt

Stutt eftir, at útróðrarmaðurin hevði borið fram síni sjónarmið, fekk Sosialurin viðmerkingar frá Fiskamarknaði Føroya sum segði, at útreiðslurnar til sølu ikki eru øktar, men hava verið tær somu í longri tíð, nevniliga 0,75% av søluvirðinum umframt byrjunargjald.

Tað, sum Fiskamarknaður Føroya "gloymdi" at siga lesarunum, er, at bæði seljari og keypari rinda hvør síni 0,75% fyri handilin – ella 1,5% tilsamans.

Tann, sum keypir fiskin, leggur ivaleyst uppfyri síni keypsútreiðslu og keypir fiskin hesi 0,75% bíligari, soleiðis at tað verður útróðrar-og fiskimaðurin annars, sum rindar tvær ferðir 0,75%.

Tað er so tað.

Á hinari síðuni hevði Fiskamarknaður Føroya hug til óbeinleiðis at "kasta" eftir Landingarmiðstøð Føroya um møguligar øktar útreiðslur fyri teir, sum landa og selja fiskin um hesa skipan.

- Er kostnaðurin fyri at sleppa av við fisk øktur, er dýrkingin ikki at finna her hjá okkum, søgdu teir á Fiskamarknaði Føroya.



*Teir eru stjórar á ávikavist Landingarmiðstøð Føroya (Kristian Fríðrik Olsen) og Fiskamarknaði Føroya (Jens Kristian Olsen)*
Mynd: Vilmund Jacobsen

### Tvey feløg

Í byrjanini og heilt fram til endan av 2004 vóru landing og søla í einum felag undir navninum Fiskamarknaður Føroya. Hin 1. januar í 2005 vórðu feløgini skild sundur, soleiðis at Landingarmiðstøð Føroya kom at standa fyri landing og avgreiðslu í hesum sambandi, meðan Fiskamarknaður Føroya bert kom at taka sær av sjálvari søluni.

Øll vóru ikki samd um rættleikan í at skilja feløgini sundur, men hildu, at feløgini undir einum betri kundu veita ta tænastu, sum á bestan hátt hevði komið vinnu og samfelagnum øllum til góðar.

- Tá Fiskamarknaður Føroya var komin, var eg ein teirra, sum mátti viðganga og byrjaði at síggja, at her lógu stórir møguleikar við eini skipan fyri alla vinnuna. Mínar royndir úr vinnuni, bæði skipa- og flakavinnuni, høvdu sagt mær, at hetta á mangan hátt hevði verið ein strævin tíð. Skipini fingu ikki avrokning frá virkjunum, menninir fingu ikki avrokning frá skipunum, og onkur útflytari var, sum avroknaði niðri í Skotlandi. Eitt kilo av fiski var ikki eitt kilo, hvørki í Føroyum ella aðrastaðni.

Hetta sigur ein vinnulívsmaður, sum Sosialurin hevur tosað við, og hann heldur, at hansara navn ikki er so avgerandi í hesum sambandi.

Sjálvur er hann sannførdur um, at tað var ein skandala, sum hann tekur til, at uppboðssølan fór burtur úr skipanini við ársenda 2004.

### Ein sparigrísur

Hann vísir á, at í staðin fyri at brúka pening til menning av skipanini í síni heild, hevur Fiskamarknaður Føroya samlað sær nógvar miljónir krónur hesi seinastu fýra árini - til at standa ímóti við, sum tað verður rópt.

- Meðan arbeiðsbyrðan á uppboðssøluni er minkað við eini 40%, tá landing og avgreiðsla av hesi fór burtur úr, tekur uppboðssølan sølan kortini 2 x 0,75% fyri søluna.

Vinnulívsmaðurin heldur onga orsøk vera hjá Fiskamarknaði Føroya at leggja sær hesar miljónir til síðis – til at standa ímóti við, tí skipanin hevur við løgtingslóg "trygd í øllum endum og kantum", sum hann tekur til. Men tað løgnasta er, sigur hann, at umboð fyri seljarar í Fiskamarknaði Føroya framvegis tvíhalda um henda "sparigrís", sum hann tekur til.

Hann vísir á, at fyri samanleggingina hevði samlaða felagið eitt sindur at standa ímóti við, tá bakkøst komu.

### Dýrtíðararbeiði

Vinnulívsmaðurin sigur seg væl skilja støðuna og trupulleikarnar, sum Landingarmiðstøð Føroya hevur.

- Við at flyta søluna til klokkan 10 á morgni, hevur Landingarmiðstøð Føroya ikki møguleikar at skilja óskildan fisk og koma við honum á marknaðin – uttan so, at farið verður av húsum á hálvari nátt til arbeiðis, tí longu klokkan 9 skulu tølini verða klár.

Stendur fiskur frá eini fýra útróðrarbátum á gólv-